## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 27 | 14 - 8 - 5 | 41 | 26 | 15 | 50 |
| 2 | Brøndby (M) | 27 | 13 - 8 - 6 | 51 | 28 | 23 | 47 |
| 3 | Farum | 27 | 14 - 2 -11 | 41 | 47 | -6 | 44 |
| 4 | FCM | 27 | 10 - 9 - 8 | 41 | 34 | 7 | 39 |
| 5 | OB (S) | 27 | 9 -10 - 8 | 44 | 39 | 5 | 37 |
| 6 | Esbjerg | 27 | 9 - 9 - 9 | 51 | 51 | 0 | 36 |
| 7 | Viborg | 27 | 8 - 9 -10 | 44 | 45 | -1 | 33 |
| 8 | AB | 27 | 8 - 9 -10 | 33 | 39 | -6 | 33 |
| 9 | AaB | 27 | 10 - 3 -14 | 35 | 42 | -7 | 33 |
| 10 | Silkeborg | 27 | 8 - 8 -11 | 41 | 39 | 2 | 32 |
| 11 | AGF | 27 | 8 - 7 -12 | 38 | 49 | -11 | 31 |
| 12 | Køge | 27 | 8 - 3 -16 | 39 | 60 | -21 | 27 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 24 | 18 - 3 - 3 | 58 | 27 | 31 | 57 |
| 2 | Frem | 24 | 15 - 4 - 5 | 53 | 31 | 22 | 49 |
| 3 | Vejle | 24 | 13 - 4 - 7 | 50 | 40 | 10 | 43 |
| 4 | Fredericia | 24 | 11 - 7 - 6 | 35 | 20 | 15 | 40 |
| 5 | Randers F. | 24 | 11 - 4 - 9 | 48 | 41 | 7 | 37 |
| 6 | HFK Sønderj. | 24 | 9 - 8 - 7 | 46 | 42 | 4 | 35 |
| 7 | Skjold | 24 | 10 - 4 -10 | 40 | 31 | 9 | 34 |
| 8 | Ølstykke | 24 | 8 - 8 - 8 | 48 | 44 | 4 | 32 |
| 9 | Brønshøj | 24 | 9 - 4 -11 | 39 | 40 | -1 | 31 |
| 10 | FC Aarhus | 24 | 9 - 3 -12 | 37 | 42 | -5 | 30 |
| 11 | AC Horsens | 24 | 7 - 7 -10 | 35 | 40 | -5 | 28 |
| 12 | B 93 | 24 | 7 - 5 -12 | 34 | 42 | -8 | 26 |
| 13 | B 1909 | 24 | 6 - 7 -11 | 41 | 55 | -14 | 25 |
| 14 | B 1913 | 24 | 6 - 6 -12 | 28 | 47 | -19 | 24 |
| 15 | Hvidovre | 24 | 6 - 5 -13 | 28 | 50 | -22 | 23 |
| 16 | HIK | 24 | 5 - 5 -14 | 30 | 58 | -28 | 20 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre), John Heri Dam (Hvidovre)

## Norska tippeligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 5 | 5 - 0 - 0 | 13 | 1 | 12 | 15 |
| 2 | Sogndal | 5 | 4 - 1 - 0 | 11 | 5 | 6 | 13 |
| 3 | Odd Grenland | 5 | 4 - 0 - 1 | 10 | 7 | 3 | 12 |
| 4 | Viking | 5 | 3 - 1 - 1 | 10 | 4 | 6 | 10 |
| 5 | Stabæk | 5 | 2 - 2 - 1 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 6 | Bodø/Glimt | 4 | 2 - 1 - 1 | 6 | 4 | 2 | 7 |
| 7 | Molde | 4 | 1 - 2 - 1 | 6 | 3 | 3 | 5 |
| 8 | Lyn | 5 | 1 - 2 - 2 | 6 | 9 | -3 | 5 |
| 9 | Vålerenga | 5 | 1 - 1 - 3 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 10 | Tromsø | 4 | 1 - 1 - 2 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 11 | Bryne | 5 | 1 - 0 - 4 | 6 | 11 | -5 | 3 |
| 12 | Lillestrøm | 4 | 1 - 0 - 3 | 2 | 9 | -7 | 3 |
| 13 | Brann | 5 | 0 - 2 - 3 | 4 | 14 | -10 | 2 |
| 14 | Aalesund | 5 | 0 - 1 - 4 | 7 | 12 | -5 | 1 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

# FCK styrkti um sína støðu

**Hvørki Todi Jónsson ella Jón Rói Jacobsen vóru á vøllinum í vikuskiftinum, tá ið FCK fekk fult á útivølli, meðan Brøndby meiri enn hálvsnávaði á heimavølli**

ÚTISETAFELØG
*Jóannes Hansen*


*Todi Jónsson var ikki við á vøllinum, tá FCK endurvann oddasessin í superliguni við sigri á Farum*

Stríðið um meistaraskapin í donskum fótbólti stendur millum FCK og Brøndby. Fyri viku síðani var Brøndby omaná. Nú er tað FCK, sum eigur møguleikan at verja fremsta plássið.

Felags fyri bæði FCK og Brøndby er, at tey hava ein føroyskan spælara ímillum teir, ið verða vigaðir, tá ið besta liðið verður sett. Í vikuskiftinum var tað felags fyri bæði liðini, at tey ikki høvdu føroysku spælararnar á besta liðnum. Felags fyri bæði liðini er framvegis, at tað er upp til tey sjálvi at gera av, um tey skulu vinna meistaraskapin. Munurin er tvey stig, og í næstsíðsta umfarinum, sum verður spælt mikudagin 18. juni, skal FCK vitja í Brøndby.

Mest harmuligt var tað leygardagin hjá Toda Jónsson, sum hóast hann hevur havt alt tað, sum hugsast kann, ímóti sær, kortini við strevi og stríði í vár hevur megnað at vunnið seg so mikið fram, at tað í síðstu viku var ilt at síggja nakran annan møguleika, enn at Todi skuldi verða millum teir fyrstu ellivu, tá ið FCK leygardagin vitjaði í Farum.

Men ólukkutíð fyri Toda Jónsson, so var hann ikki førur fyri at spæla leygardagin.

– Undir venjing í síðstu viku fekk eg ein lítlan løst í lærið. Eg royndi at venja fríggjamorgunin, men tá varð skjótt staðfest, at tað var eingin møguleiki hjá mær at verða tøkur leygardagin, tíverri, sigur Todi Jónsson. Og tað er væl skiljandi, at hann harmast.

Jón Rói Jacobsen hevur verið millum lítið og einki á Brøndby liðnum, síðani hann var í Føroyum og spældi landsdystir ímóti Kasakstan, og Jón Rói var ikki á Brøndby liðnum, sum sunnudagin spældi ímóti AGF.

### Zuma skoraði

Tað eydnaðist FCK leygardagin at koma úr Farum og aftur til Keypmannahavnar við øllum stigunum. Men tað sá leingi illa út. FCK hevði í fyrra umfarinum meiri spæl og størri møguleikar enn gestirnir, men teir fingu einki mál. Í 2. hálvleiki hevði Farum betri tak á spælinum, enn teir høvdu havt í fyrra umfarinum, men teir fingu einki mál.

Sigursmálið fekk FCK, tá ið tað bara restaðu fýra minuttir. Væl upplagdi svenski FCK álopsmaðurin, Jörgen Pettersson, legði aftur til Zuma, sum úr meiri enn 20 metra fjarstøðu smekkaði til, og bólturin sang í netinum aftanfyri Farum málverjan.

Zuma hevur ikki verið sannførandi síðani vetrarsteðgin. Hann hevur ikki skorað mál, og at hann hevur verið frustreraður hevur havt útvísing og leikbann við sær. Ivaleyst er tað møðin av at hava spælt fótbólt í næstan tvey ár uttan hvíld, sum er farin at gera um seg. Summar-frítíðin í fjør var lítil og eingin, tí Zuma var við suðurafrikanska landsliðnum í HM kappingini í Suðurkorea og Japan.

At Zuma ikki hevur verið so væl upplagdur, hevur havt við sær, at hann tær seinastu ferðirnar ikki hevur verið millum teir fyrstu ellivu hjá FCK. Sunnudagin varð hann skiftur inn í 2. hálvleiki, og tað var ein heppin innskifting, tí Zuma skoraði sigursmálið.

Hóast tapið so er Farum framvegis á triðja plássinum og harvið halda teir kósini fram ímóti bronsukrónunum.

### AGF fekk javnleik

Í Brøndby vóru sunnudagin 19.195 áskoðarar, sum stuðlaðu heimaliðnum, ið stríddist fyri at endurvinna fremsta plássið, sum FCK hevði tikið leygardagin. Tað eydnaðist ikki Brøndby at vinna trý stig og harvið oddasessin.

Úrslitið ímóti botnliðnum úr Århus var 1–1. AGF var kroyst í botn fyrstu løtuna, men teir megnaðu at halda tætt, og tá ið ein hálvur tími var farin, komu teir á odda. Peter Graulund stútaði bóltin í kassan. Stutt undan steðginum stútaði sami spælari aftur bóltin í málið, men dómarin kolldømdi. Hann og linjuverjin mettu ikki, at bólturin stakk av tvørtrænum og inn um málstrikuna, men heldur niður á strikuna. Upptøkurnar vístu, at tað átti havt verið dømt mál og harvið 2–0 til AGF, og so er spurningurin, hvussu tað hevði tørnað út.

Í 2. hálvleiki helt Brøndby fram at trýsta og spæla. Teir raktu bæði í uppstandara og tværtræ, og teir í AGF bjargaðu á strikuni. Men tað eydnaðist eina ferð Brøndby at fáa mál. Peter Foldgast stútaði í málið eftir innlegg.

Javnleikurin hevði við sær, at Brøndby misti fet í oddastríðnum. Hóast teir megnaðu framúr javnleik í Brøndby, so eru teir í AGF framvegis niðanfyri niðurflytingarstrikuna. Men teir í Århus tykjast at hava fingið mót av nýggjum, og venjarin sigst ikki sita so leysur í stólinum sum onkur annar.

# Ferðin í Molde er lítil

**Tað eydnaðist ikki Molde at skjóta mál á heimavølli ímóti Stabæk, meðan tað gongur sum eftir ánni hjá Rosenborg og Sogndal**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Við føroyskum eygum er sama skilið í norskum fótbólti, sum tað hevur verið higartil í ár. Aftur í vikuskiftinum var Jákup Mikkelsen á beinkinum hjá Molde, og aftur hesa ferð meiri enn hálvsnávaði føroyska liðið í norskum fótbólti.

Molde hevði vitjan av Stabæk, og úrslitið var málleysur javnleikur. Harvið varð tað greitt, at nú fimm umfør eru farin av Tippuliguni, hevur tað bara eina ferð eydnast Molde at fáa fulla úrtøku.

Eddie Gustafsson var í Molde málinum, og í norsku pressuni verður mett, at hann var millum teir fremstu hjá Molde. Tvær ferðir bjargaði svenski málverjin, tá ið mótstøðumenn komu einsamallir ímóti honum.

Tað gongur sum eftir ánni hjá Rosenborg. Hesa ferð var meistaraliðið úr Tróndheimi á vitjan hjá Viking í Stavanger, sum tapti 2–0. Harvið hevur Rosenborg fingið fimtan stig í fimm teimum fyrstu umførunum.

Sogndal hongur uppi í Rosenborg. Hesa ferð hevði gamla føroyska felagið vitjan av Brann úr Bergen. Í fjør var um reppið at Brann flutti niður, og teir stríðast við sama trupulleikan í ár. Sogndal vann 2–0. Í báðum førunum var Håvard Flo málskjútti.

Lyn hevði ikki vunnið í fýra teimum fyrstu umførunum. Men tað eydnaðist hjá teimum, tá ið uppflytararnir úr Aalesund vitjaðu. Lyn vann 2–1.

Odd vann á heimavølli 3–1 ímóti Vålerengen, og Bodø/Glimt vann 3–1 á heimavølli ímóti Bryne. Gestirnir hildu seg at hava havt mesta spælið og størstu møguleikarnar. Heimaliðið skoraði mál í tveimum teimum fyrstu atsóknunum, sum teir høvdu á málið hjá gestunum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Tann brosandi yvirgangsmaðurin kann fáa deyðarevsing

*Tann brosandi yvirgangsmaðurin brosaði ikki, tá hann møtti í rættarhølinum á Bali í gjár*



**Tann brosandi Amrozi brosaði ikki, tá hann kom fyri rættin í Indonesia í gjár. Hann er ákærdur fyri at hava útvegað spreingievnið til ta ógvusligu spreingingina á Bali í oktober í fjør, sum kravdi 202 mannalív.**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen*

Mekanikarin Amrozi er tann fyrsti, sum kemur fyri rættin í sambandi við ta ógvusligu bumbuspreingingina, sum kostaði 202 mannalív á friítíðaroynni Bali tann 11. oktober í fjør. Indonesisku myndugleikarnir vilja vera við, at tað var Amrozi, sum útvegaði bumbumonnunum spreingievnið til bumburnar.

Undir avhoyringunum hjá løgregluni skal Amrozi hava sagt, at ætlan hansara var at beina fyri so nógvum amerikanarum sum gjørligt, og at han einans iðrar seg um, at bumbuatsóknin kostaði fleiri avstraliumonnum enn amerikanarum lívið.

Amrozi hevur verið umrøddur sum tann brosandi yvirgangsmaðurin, tí hann hevur altíð verið brosandi, men so var ikki, tá hann møtti í rættarhølinum í gjár. Hann sat tigandi og lýddi á, meðan ákærin las tað 33 síður langa ákæruritið. Verjar hansara hava eisini sagt, at verður hann funnin sekur, kann hann fáa deyðarevsing.

Rættarmálið er á Bali, og myndugleikarnir skipaðu fyri umfatandi trygdartiltøkum á fyrsta rættarfundinum. Meiri enn 300 løgreglumenn stóðu á varðhaldið við dómhúsið, og aðrastaðni á oynni stóðu næstan 3.000 løgreglumenn til reiðar. Myndugleikarnir hava eisini sent fleiri spreingiserfrøðingar til oynna.

Umleið 30 fólk, øll muslimar, eru tikin í sambandi við atsóknina á Bali.

# Gevast at leita eftir ólógligum vápnum

**Teir fyrstu amerikansku serfrøðingarnir, sum komu til Irak at leita eftir hópoyðingarvápnum, fara nú heimaftur. Teir funnu eingi vápn.**

IRAK
*Árni Joensen*

Avgerðin at lata serfrøðingarnar fara heimaftur er ein ósigur fyri George W. Bush, forseta, sum seinastu mánaðarnar hevur hildið uppá, at Irak hevði hópoyðingarvápn, og at amerikanararnir fóru at finna tey. Júst hópoyðingarvápnini vóru eisini grundgeving forsetans fyri at leypa á Irak.

- Vit halda ikki, at vit fara at finna nøkur tílík vápn, sigur heryvirmaðurin Tom Barid við blaðið Washington Post.

Hann hevur seinastu tíðina arbeitt saman við einum liði av vápnaserfrøðingum, sum nú hava fingið boð um at stinga í sekkin og at fara heimaftur. Leiðarin hjá serfrøðingunum, obersturin Robert Smith, sigur við Washington Post, at teir komu til Irak at leita eftir evnafrøðiligum og lívfrøðiligum vápnum, men mugu ásanna, at teir einki hava funnið.

Eygleiðarar siga, at hendan ásannanin er ringur biti hjá Colin Powell, uttanríkisráðharra at svølgja. Víst verður á, at tann 5. februar legði Powell eina røð av "prógvum" fyri ST-trygdarráðið, har hann segði Irak hava fleiri hundrað tons av lívshættisligum lívfrøðiligum og evnafrøðiligum vápnum. Samstundis segði hann seg kunna prógva, at Irak hevði rakettir, sum kundu løðast við hópoyðingarvápnum, og at irakar vóru í ferð við at gera eina kjarnorkubumbu.

Summir amerikanarar halda, at tað eydnaðist irakum at beina fyri teimum seinastu ólógligu vápnunum, áðrenn amerikanarar og bretar tóku seg fram.

## Dávid verður sitandi

Íslendski forsætisráðharrin, Dávid Oddsson, sleppur at halda fram sum stjórnarleiðari aftan á altingsvalið leygardagin. Teir báðir stjórnarflokkarnir, Sjálfstæðisflokkurin og Framsóknarflokkurin, fingu 51,4 prosent av atkvøðunum og 34 av teimum 63 limunum í Altinginum. Á valinum fyri fýra árum síðani fingu flokkarnir 57 tingsessir.

Størstu framgongdina á valinum leygardagin hevði tann sosialdemokratiska Samfylkingin. Flokkurin fekk meiri enn 30 prosent av atkvøðunum, og hetta er fyrstu ferð í meiri enn 70 ár, at ein íslendskur flokkur hevur fingið meiri enn 30 prosent.

Dávid Oddsson hevur verið forsætisráðharri seinastu tólv árini, og hann er tann stjórnarleiðarin í Evropa, sum hevur sitið longst í leiðarasessinum. Nú fær hann so fýra ár afturat.

## Leingja freistina

Síðani yvirgangsatsóknirnar í USA 11. september í 2001 hava myndugleikarnir í Bretlandi tikið fleiri fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava havt samband við yvirgangsfelagsskapir.

Samstundis avgjørdu myndugleikarnir, at teir kunnu hava fólk sitandi í varðhaldi í sjey dagar uttan at skuldseta tey, og nú hevur stjórnin skotið upp at leingja hesa freistina til fjúrtan dagar. David Blunkett, innanríkisráðharri, sigur, at tað er neyðugt at leingja freistina, tí nógv av málunum eru so torgreidd, at løgreglan má fáa betri stundir til at avgreiða tey.

Uppskotið hjá stjórnini kemur til viðgerðar í parlamentinum 20. mai, men longu nú ávara mannarættindafelagsskapir og onnur ímóti tí. Mannarættindafelagsskapurin Liberty sigur, at uppskotið hjá stjórnini er illa umhugsað og óneyðugt. Felagsskapurin heldur, at myndugleikarnir eiga heldur at bøta um arbeiðsmøguleikarnar hjá trygdar- og fregnartænastunum.

## Sviar í verkfalli

Umleið 46.000 starvsfólk hjá 60 svenskum kommunum fóru í verkfall á midnátt sunnukvøldið.

Verkfallið ger, at barnagarðar og skúlar eru stongdir, eingin reingerð er á almennum skrivstovum, og ruskavningin er steðgað. Allar kommunalar ítróttar- og svimjihallir eru eisini stongdar. Samstundis ávara myndugleikarnir um, at verkfallið kann elva til trupulleikar við vatnveitingini, og í summum førum rakar verkfallið eisini heilsuverkið. Í gjár fóru 5.000 elektrikarar í samhugaverkfall.

Á seinasta semingsfundinum sunnudagin buðu kommunurnar sær til at lata heilsu- og røktarstarvsfólki og starvsfólkinum í barnagørðunum fimm prosent meiri í løn, men tað vildu fakfeløgini ikki góðtaka.

## Prestar vilja hava yvirtíð

Prestarnir í donsku fólkakirkjuni tíma ikki at arbeiða meiri enn 37 tímar um vikuna, fáa teir ikki yvirtíð fyri eykaarbeiðið.

Kristeligt Dagblad skrivar, at nakrir av prestunum hava gjørt av at senda myndugleikunum arbeiðsseðlar og at krevja yvirtíð fyri tað, sum er oman fyri 37 tímar um vikuna. Blaðið skrivar eisini, at ósemja er í Prestafelagnum um ætlanina, og at nógvir prerstar bera ótta fyri, at hetta kann enda við, at myndugleikarnir fara at halda eyga við, hvussu nógv teir einstøku prestarnir arbeiða.

Játta myndugleikarnir prestunum yvirtíð, fer tað at síggjast aftur. Jesper Yde, sum er nevndarlimur í Prestafelagnum, sigur við Kristeligt Dagblad, at í summum førum snýr tað seg um meiri enn 10.000 krónur um mánaðin.